gult cyan magenta svart



# Finaludagurin nærkast

**Funnið er nú fram til fýra lið, sum skulu leika hálvfinalurnar í steypakappingini**



BRIDGE
*Bogi Simonsen og Arnbjørn Sivertsen*

## Steypakappingin

Fýra lið eru klár til at leika hálvfinalurnar í steypakappingini í bridge, ið verður leikt í Lonuni í Fuglafirði 10. mars kl. 10:00. Liðini eru:

**Carl Mikkelsen**
Reimund Langaard
Atli Hansen
Jógvan Ranghamar

**Magni Jøkladal**
Pól Egholm
Árant Berjastein
Dia Jacobsen

**Rói á Rogvu Joensen**
Símin Lassaberg
Árni Dam
Marner Joensen

**Marjun Restorff**
Arnleyg Mikkelsen
Eyðun Jensen
Eyðun Joensen

Hvør, ið skal spæla móti hvørjum, verður avgjørt við einum lutakasti líka áðrenn spælast skal. Hálvfinalurnar verða avgjørdar yvir 40 spøl, og finalan verður yvir 48 spøl. Bæði hálvfinalurnar og finalan verða leiktar sama dag. Hetta setur krøv til konditiónina hjá teimum leikarum, ið koma í finaluna, tí 88 spøl uppá ein dag er sera strævið.

Vinnandi liðið fer at umboða Føroyar í Rottneros Cup, sum verður leikt í Svøríki síðst í mai. Hetta er ein kapping, ið verður hildin annað hvørt ár fyri steypavinnarum úr Norðanlondum, so talan er um eina sera sterka kapping. Fyrra árið var liðið hjá Farodane umboð fyri Føroyar.



*Um tvær vikur verður steypakappingini avgjørt, tá hálvfinalur og finala verða avgreidd ein og sama dag*

### Farodane útsligið

Av teimum liðinum, ið hava vunnið sær pláss í hálvfinuluni, stóð liðið hjá Carl Mikkelsen nokk fyri tí mest óvæntaða úrslitinum tá ið teir vunnu á Farodane við einum imp. Sigast má, at Farodane var favorittur til at vinna dystin.

Vit skulu her vísa nøkur spøl frá dystinum millum Carl og Farodane, sum varð leiktur leygardagin 17. februar.

E/-

North: AJ / AQ104 / K72 / Q1087
West: Q873 / 76 / 10965 / K63
East: 2 / 9853 / QJ4 / J9542
South: K109654 / KJ2 / A83 / A

NS: Reimund Langgaard og Carl Mikkelsen.
EV: Hans J. Petersen og Arnbjørn Sivertsen.

| N | E | S | V |
|---|---|---|---|
| - | pass | 1sp | pass |
| 2kl | pass | 2sp | pass |
| 4hj | pass | 5rú | pass |
| 6sp | pass | pass | pass |

4hj: Trelde. Spyr um kontrol í hj.
5rú: Kontrol í hj og 3 ess av 5 (spK verður taldur við sum ess).

12 løtt stikk, mótspælið fekk bara fyri spQ. Við hitt borðið meldaði Farodane 3ut. 10 imp til Carl.

N/NS

North: Q765 / Q53 / K854 / A3
West: J2 / KJ96 / AQJ7 / J98
East: AK109843 / - / 93 / KQ102
South: - / A108742 / 1062 / 7654

NS: Reimund Langgaard og Carl Mikkelsen.
EV: Hans J. Petersen og Arnbjørn Sivertsen.

| N | E | S | V |
|---|---|---|---|
| 1rú | D | 1hj | 3ut |
| pass | 4ut | pass | 5rú |
| pass | 5sp | pass | pass |
| pass | | | |

4ut: Spyr eftir essum.
5rú: Eitt ess.

E-V komu í 5sp við bæði borðini. Carl spældi rútara út. Hans Jacob tók við essinum og spældi spaðara til essið. Tá spQ sat fjórða ímóti, var kontraktin dømd at fara niður. Mótspælið fekk fyri spQ, rúK og klA.

Við hitt borðið høvdu N-S bara meldað pass, og tí var hjA eitt rímiligt útspæl móti 5sp. Útspælið gjørdi, at kontraktin vann, tí ein rútari kundi kastast uppá hjK. 11 imp til Carl.

75
KQJ
AQJ103
AJ8

Ein trupul hond at melda? Tað helt Atli! Hann opnaði 1rú, og tá makkarin svaraði 1hj, valdi Atli at springa í 3kl! Jógvan spurdi eftir essum og setti kontraktina í 6kl, sum Atli flutti til 6hj. Kortini sótu soleiðis:

North: Q10986 / 8 / 654 / 10843
West: KJ / A1064 / K87 / K762
East: 75 / KQJ / AQJ103 / AJ9
South: A432 / 97532 / 92 / Q5

Spaðari kom út til essið, og tá hjartarin sat 5-1 ímóti, var einki at gera, kontraktin fór niður. Við hitt borðið meldaði Farodane soleiðis:

| V | E |
|---|---|
| Niels | Bogi |
| • | 1rú |
| 1hj | 2ut |
| 6ut | |

Bogi tók 12 stikk og 17 imp til Farodane.

Tá 8 spøl vóru eftir at leika , var liðið hjá Carl framman fyri við 23 imps. Farodane hálaði 22 imp inn í hesum spennandi spølunum. Tað eina impið, ið manglaði í kundi komið í fleiri av spølunum. Hetta seinasta spælið, sum vit vísa frá dystinum, kundi farið báðar vegir.

N/EV

North: 73 / K6 / A108 / J98654
West: QJ1095 / QJ54 / J9 / K10
East: 842 / 10732 / K72 / A73
South: AK6 / A98 / Q6543 / Q2

NS: Hans J. Petersen og Arnbjørn Sivertsen.
EV: Atli Hansen og Jógvan Ranghamar.

| N | E | S | V |
|---|---|---|---|
| pass | pass | 1ut | pass |
| 2ut | pass | pass | pass |

Útspælið var spQ. Arnbjørn lat hana eiga, og Jógvan spældi spaðara aftur til kongin. Arnbjørn spældi nú klQ, og Jógvan var kvikur at taka við konginum. Sært tú, hví hann ikki skal taka við konginum? Atli kemur inn uppá klA, spælir spaðara, og so hevur Jógvan klK eftir sum innkomu til teir báðar seinastu spaðararnar. Kontraktin 2ut vinnur altíð hóast tað, so hetta hevði ikki so stóran týdning.

Við hitt borðið gekk spælið á júst sama hátt, men her hevði tað tíverri fyri liðið hjá Farodane størri týdning. Carl og Reimund meldaðu 1ut — 3ut. 400 fyri 3ut +3 gav liðnum hjá Carl 6 imp. Um Niels og Bogi høvdu funnið tað setandi mótspælið, høvdu 5 imp farið hinvegin.

gult cyan magenta svart



# Havnin vann á Klaksvík

**Undan seinasta umfari liggur havnarliðið nú trygt á odda eftir teirra sigur á klaksvíkingum, men enn kunnu fimm lið vinna FM-heitið. Sandavágsmenn mugu tungu leið niður í 2. deild.**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Níggjunda og næstseinasta umfar í liðkappingini var telvað um vikuskifti, og tí-skil eitt sera umráðandi og avgerandi umfar. Serliga dysturin millum Havnina og Klaksvíkina varð av alstórum týdningi. Ikki bert um oddasessin, men sanniliga spældi stoltleiki eisini sín lut í júst hesum toppdysti.

Havnarmenn høvdu styrkt sær við útisetanum Flóvin Tór Næs, meðan Rani Nolsøe varð aftur á klaksvíksliðnum. Talvið teirra millum á fyrsta borði varð áhugavert og spennandi, eftirsum teir telvaðu klassiska kongaindiska byrjan, har Rani við svarta fólkinum skjótt útjavnaði. Flóvin fekk tó í miðspælinum betri støðu, men í tíðarneyðini misti hann mann og gavst stutt eftir.

Steintór Rasmussen og Haldur S. Johansen leiktu javnleik á øðrum borði. Steintót hevði møguliga munin, men Haldur leikti neyvt og fekk hálvan posa.

Tummas M. Anthoniussen hevur ikki leikt eins sannførandi í seinnu helvt sum í fyrru helvt av kappingini. Herluf Hansen hevur hinvegin telvað væl í seinnu helvt, og vann hann eisini ímóti Tummasi, tá hann longu í byrjanarspælinum fekk stóran fyrimun.

Á fjórða borði átti Ingolf Gaard úr Klaksvík helst at vunnið, men Johan E. Hansen var kaldur og helt út, og tá Ingolf í tíðarneyðini misti tamarhaldið, varð Johan skjótur og vann.

Havnarmennirnir hava veruliga reist seg eftir sera slaka byrjan og eru nú heldur óvæntað á odda, og kunnu sjálvir avgera FM-heitið. Klaksvíkingar høvdu góða byrjan, men hava verið alt ov óstøðugir, og blíva nú hareftir sektaðir.

## Endaspurtur

Vestmenningar eru nú á øðrum plássi eftir 3-1 sigurin á sandavágsmonnum, sum eisini merkir at teir úr Sandavági ikki kunnu bjarga sær undan niðurflyting.

John Rødgaard, sum hevur havt nøkur ivasom úrslit í ár, vann ímóti Torkil Nielsen á fyrsta borði og Torbjørn Thomsen vann eisini sítt talv ímóti Gutta Petersen.

John Jacobsen hevur eisini víst gott spæl hesar seinastu vikurnar, og hetta fekk Heri Christoffersen eisini at merkja í vikuskiftinum. Sonni Nielsen fekk einasta stig fyri sandavágsmenn tá hann vann á Petur Højgaard.

Ein góður sigur hjá vestmenningum, sum eisini varðveitir FM møguleikan.

## GM Tiger

Kollfirðingar hava nakrir stórmeistarar og altjóða meistarar á styrkilista teirra og ímóti Hvalvík høvdu teir GM Tiger H. Persson við á liðnum. Hann vann á Martin Brekká.

Hans Kristian Simonsen hevur prógvað sínar dygdir í ár, men ímóti Finnbjørn Zachariassen mátti hann lúta. Karl L. Johansen og Sámal Christiansen leiktu javnt, meðan sumbingurin Alvin Joensen, sum nú leikar og býr í Kollafirði vann á Bergi Magnussen.

Eitt afturstig fyri hvalvíkingar, sum hitta sandavágsmenn í seinasta umfari og muga tá vinna stórt. Havnin — Kollafjørður og Vestmanna — Klaksvík verða hinir dystirnir í seinasta umfari, sum verður leikt leygardagin 3. mars í Hósvík.

Ómetaliga javnt hevur verið í ár, heili fimm lið kunnu enda ovast tá avtornar, og er hetta eitt nærum óhoyrt fyribrigdi.

## Havnin somuleiðis á odda í 2. deild

Ikki bert varð Flóvin komin heim at styrkja Havnar Telvingarfelag í vikuskiftinum, eisini varð Martin Poulsen heima og leiktu fyri Havina 2. Lógin sigur at ikki fleiri enn ein útiseti kann manna eitt einstakt lið, og tískil kundi Martin ikki leika á fyrsta liði. Men 2. lið hjá Havnini hevði eisini brúk fyri stuðul í toppdystinum ímóti Toftum, sum lógu á odda.

Helgi Joensen megnaði ein javnleik ímóti Martin á fyrsta borði, og eisini Wenzil Højgaard fekk hálvt ímóti Suna Merkistein. Triðja- og fjórða borð hjá Havnini vunnu, sum merkti at Havnin 2 vann 3-1 og liggja nú hálvtannað stig fremst undan seinasta umfari. Havnin 2 hittir Klaksvík, meðan Toftamenn mugu vinna stórsigur á gøtumonnum 3. mars.

Runavík og Gøta berjast um triðja pláss, meðan Havnin 3 stríðist undan niðurflyting.

Í triðju deild liggur Vestmanna tvey stig fremst, sjálvt um teir taptu í vikuskiftinum á Kollafjørð. Nummar tvey er Havnin.

## Talvfelagið Føroyar stevnur ímóti 2. deild

Við knúsandi 7-1 stórsigri ímóti botnliðnum Vanløse í vikuskiftinum, hava útisetar okkara lagt seg klárt á odda í 3. deild undan seinasta umfari. Ballerup sum annars lógu hálvt stig fremri enn føroyingarnir, leiktu sín dyst 4-4, og eru nú hálvttriðja stig aftanfyri Talvfelagið Føroyar.

Útlitini er tískil góð at flyta upp, men enn er tó einki avgjørt. Útisetarnir skulu nevnliga í torførari dyst enn kappinganeytarnir Ballerup í seinasta umfari, men væntandi flyta teir upp kortini.

Teir sum vunnu sunnudagin vóru; Heini Olsen, Eyðun Nolsøe, Bogi Ziska, Jóan H. Andreasen, Carl Eli Nolsøe Samuelsen og Finnbjørn Vang, meðan John Arni Nilssen og Heini Danielsen leiktu javnleik.

## Javnt í Linares

Sterka talvkappingin í Linares byrjaði fríggjadagin, og frídagur var mánadagin. Sostatt eru trý umfør telvað og sigast kann ikki annað, at orðið javnleikur er yvirskriftin higartil. Kasparov, Shirov, Leko, Karpov, Polgar og Grischuk hava øll 1,5 stig og liggja tí øll á deildum fyrsta plássi. Sera merkisverd støða, og at øll níggju talvini eru endaði jøvn ger støðuna bert enn meira marghþáttliga.

Fyrrverandi heimsmeistarin Anatoly Karpov hevur telvað væl, og átti at vunnið á Shirov í fyrsta umfari, meðan Kasparov ikki veruliga hevur funnið stórspæli fram og Grischuk hongur væl í við sínum javnleikum. Meir um kappingina í fríggjadagsblaðnum.

## Talvið hesa vikuna

Vinnarin av 3rd Tórshavn International Alexander Grischuk hevur eins og øll í kappingini leikt øll trý talvini jøvn. Í hesum talvi sum varð telvað í fyrsta umfari fær hann einki stórvegis burturúr byrjanini og má stríðast fyri javnleikin ímóti heimsins sterkastu kvinnuliga telvaranum

**Grischuk,A (2663) - Polgar,J (2676)**
**Super GM Linares ESP (1), 23.02.2001**

1.e4 c5 2.Nf3 e6 3.d4 cxd4 4.Nxd4 Nc6 5.Nc3 Qc7 6.Be2 a6 7.0-0 Nf6 8.Kh1 Nxd4 9.Qxd4 Bc5 10.Qd3 b5 11.f4 Bb7 12.Bf3 0-0 13.e5 Ne8 14.a4 b4 15.Bxb7 Qxb7 16.Ne4 Be7 17.Be3 Qc6 18.Ng5 g6 19.Rad1 d6 20.Bd4 dxe5 21.Bxe5 Nf6 22.Qh3 h5 23.Nf3 Ng4 24.Nd4 Qc5 25.Qg3 Rad8 26.c3 bxc3 27.bxc3 Rd5 28.Rde1 Rc8 29.Rf3 Bf8 30.h3 Nxe5 31.fxe5 Bg7 32.Rfe3 Qa5



33.Nxe6!? fxe6 34.Qxg6 Qb6 35.Rf3 Rf8 36.Rxf8+ Kxf8 37.Rf1+ Kg8 38.Qe8+ Kh7 39.Qxh5+ Kg8 40.Qf7+ Kh7 41.Qh5+ Kg8 42.Rf4 Qb1+ 43.Kh2 Bxe5 44.Qf7+ _-_

## 1. Deild

**KT-TFS 2.5-1.5**

| | |
|---|---|
| 1. GM Tiger H. Persson (2480) - Martin Brekká (2070) | 1-0 |
| 2. Hans K. Simonsen (1785) - Finnbjørn Zachariassen (2045) | 0-1 |
| 3. Karl L. Johansen (1720) - Sámal Christiansen (1845) | 0.5-0.5 |
| 4. Alvin Joensen (1600) - Bergur Magnussen (1755) | 1-0 |

**ST-VT 1-3**

| | |
|---|---|
| 1. Torkil Nielsen (2055) - IM John Rødgaard (2335) | 0-1 |
| 2. Gutti Petersen (1575) - Torbjørn Thomsen (2220) | 0-1 |
| 3. Heri Christoffersen (1630) - John Jacobsen (1915) | 0-1 |
| 4. Sonni Nielsen (1745) - Dánjal P. Højgaard (1840) | 1-0 |

**KTF-HT 1.5-2.5**

| | |
|---|---|
| 1. Rani Nolsøe (2170) - Flóvin T. Næs (2235) | 1-0 |
| 2. Steintór Rasmussen (2055) - Haldur S. Johansen (2030) | 0.5-0.5 |
| 3. Tummas M. Anthoniussen (1900) - Herluf Hansen (2020) | 0-1 |
| 4. Ingolf Gaard (1770) - Jóhan E. Hansen (1595) | 0-1 |

**Støðan eftir 9. umfar**

| | | |
|---|---|---|
| 1. HT, Tórshavn | 5-3-1 | 21 |
| 2. VT, Vestmanna | 3-3-3 | 19 |
| 3. KT, Kollafjørður | 4-2-3 | 18 |
| 4. KTF, Klaksvík | 3-2-4 | 18 |
| 5. TFS, Hvalvík | 3-2-4 | 18 |
| 6. ST, Sandavágur | 1-4-4 | 14 |

## 2. Deild

**RT-KTF 2 3-1**

| | |
|---|---|
| 1. Ólavur Simonsen (2200) - Petur Hans Poulsen (1830) | 1-0 |
| 2. Brandur K. Jacobsen (1710) - Esbern Christiansen (1605) | 1-0 |
| 3. Eyðun Lamhauge (1610) - Rani Tómasson (1130) | 1-0 |
| 4. Brandur Højgaard (1455) - Egil Finnson | 0-1 |

**HT 2-TT 3-1**

| | |
|---|---|
| 1. Martin Poulsen (2130) - Helgi Joensen (1735) | 0.5-0.5 |
| 2. Suni Merkistein (1980) - Wenzil Højgaard (1735) | 0.5-0.5 |
| 3. Jóhan Gaard (1820) - Justines Hansen (1680) | 1-0 |
| 4. Jógvan Næs (1680) - Andrias Andriasen (1755) | 1-0 |

**GT-HT 3 1.5-2.5**

| | |
|---|---|
| 1. Jónfinn Thomsen (1850) - Jón Andreasen (1635) | 0-1 |
| 2. John Joensen (1725) - Jóannes V. Hansen (1645) | 0-1 |
| 3. Reinhold Isaksen (1725) - Jóannes Guttesen (1505) | 0.5-0.5 |
| 4. Jákup F. Joensen (1690) - Jákup D. Joensen (1390) | 1-0 |

**Støðan eftir 9. umfar**

| | | |
|---|---|---|
| 1. HT 2 | 8-1-0 | 23.5 |
| 2. TT | 6-1-2 | 22 |
| 3. GT | 3-0-6 | 18.5 |
| 4. RT | 4-0-5 | 17.5 |
| 5. KTF 2 | 3-0-6 | 14.5 |
| 6. HT 3 | 2-0-7 | 12 |

## 3. Deild

**Rókur-HT 4 0.5-3.5**

| | |
|---|---|
| 1. Árni M. Dam - Suni Jacobsen (1675) | 0-1 |
| 2. Hans E.S. Jensen (1005) - Øssur Joensen (1650) | 0-1 |
| 3. Mikkjal Joensen (1140) - Jákup A. Jensen (1580) | 0-1 |
| 4. Archibald Andreasen (1290) - Frants Eliassen (1420) | 0.5-0.5 |

**KT 2-VT 2 1.5-2.5**

| | |
|---|---|
| 1. Grettir Djurhuus (1850) - Kári Durhuus (1770) | 0-1 |
| 2. Hans J. Petersen (1805) - Jón Mikkelsen (1665) | 0.5-0.5 |
| 3. Niclas Joensen (1760) - Jákup á. R. Andreasen (1640) | 0-1 |
| 4. Hans P. Joensen (1655) - Jákup Durhuus (1630) | 1-0 |

**VT 3-KTF 3 4-0**
KTF 3 møtti ikki

**Støðan eftir 9. umfar**

| | | |
|---|---|---|
| 1. VT 2 | 7-0-2 | 26.5 |
| 2. HT 4 | 7-1-1 | 24.5 |
| 3. KT 2 | 5-0-4 | 22 |
| 4. VT 3 | 3-1-5 | 13 |
| 5. KTF 3 | 2-0-7 | 11.5 |
| 6. Rókur | 2-0-7 | 10.5 |